# Sjáldsamur hvítur stari



Ein stari, ið er albino, er sjáldsamur, tí hann sæst sera væl, men í Vági hevur ein hildið til síðstu mánaðirnar. Hann er styggur,og tískil ringur at avmynda, men kanska eigur júst hesin eginleikin lívið í honum

**At starar eru hvítir, sonevndir albino ella litloysingar, er sera sjáldsamt, tí hesir liva vanliga ikki longi. Ein slíkur hvítur stari er tó sæddur síðstu mánaðirnar, men sambært serkønum eru vónirnar um eitt langt lív smáar hjá slíkum fugli**

FUGLALÍV
*Dagfinn Olsen*

Í Vági hava fólk lagt til merkis, at ein hvítur stari ferðast millum hinar vanligu, myskulittu stararnar. Talan er um ein albino, litloysing.

Hesir eru sera sjáldsamir, tí stari er eitt fongdýr. Sagt øðrvísi merkir hetta, at starin er í vandabólki, tí so mong eru eftir honum. Tiltikin er jú smyril í staraflokki.

### Hevur ongan møguleika

Jens-Kjeld Jensen, fuglaútstappari, sigur, at tað er sjáldsamt at síggja stara, ið er albino, tí hesir yvirliva ikki longi. Annars er fyribrigdið albino vanligt, bæði hjá djórum og fólkum. Ein 100% albino er eyðkendur við, at lithinnan (iris) í eygunum er reyð.

Jens-Kjeld Jensen sigur, at vanligari er at síggja lunda og onnur fuglasløg, ið eru albino, tí hesi hava størri møguleika at klára seg. Tá smyril t.d. veiðir í staraflokki, so velur hann ein at leggja eftir. Tá er lættast at velja út tann, ið er hvítur, og sum harvið er so sera ólíkur hinum í flokkinum.

Av tí, at starin verður veiddur av so mongum, hevur hann lítlan og ongan møguleika at klára seg. Jens-Kjeld Jensen er tí bilsin at hoyra aftur um hetta nú, tí hann hevur hoyrt um hetta fyri nøkrum mánaðum síðani. Tá úr Runavík. Og sannlíkt er, at talan er um sama stara.

Starin er sera styggur og tí eisini ringur at avmynda. Men kanska eigur júst hesin eginleikin eisini lívið í albino staranum.

Men fuglaútstapparin í Nólsoy gevur ikki staranum stórar møguleikar, nú veturin nærkast. Fjararnir hjá albino fuglinum eru nevniliga av verri góðsku, enn hjá øðrum fugli, og bjálvingin er ikki eins góð.

Jens-Kjeld Jensen sigur, at í Nólsoy eru t.d. fleiri starar, ið hava nakrar hvítar fjarar, men at síggja ein 100% albino stara er sjáldsamt.




# Ragnar til Nashville at taka upp



**Um 14 dagar fer Ragnar í Vík til USA, har hann skal taka upp sangir til sína næstu fløgu. Og upptøkuhølið er sjálvsagt nærhendis country-miðstøðini Nashville**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*

Ragnar í Vík sást síðst á palli, tá hann til Listastevnu Føroya sang saman við Kathy Chiavola, country songstjørnu úr Nashville.

Fyri nøkrum árum síðani gav Ragnar í Vík út fløgu, ið setti hann á Føroyakortið, sum ein hin fremsta innan countrytónleikin. Men minst líka væl gekk úti í heimi, og Hank Williams tulkingarnar hjá Ragnari ruku upp eftir fleiri topp-listum úti í stóru verð.

### Til USA

Og nú roynir Ragnar seg aftur. Um 14 dagar seta Ragnar, og konan Alis, kós ímóti Nashville í Tennesee.

Ragnar hevur í hesum døgum lagt síðstu hond á eina skrá við 14 sangum, ið hann ætlar at taka upp á ferðini í USA. Har eru nýggj og eldri løg, umframt heimagjørt tilfar. Og talan er sjálvsagt um countrytónleik.

Upptøkuhølið, har Ragnar skal taka upp, liggur nakað uttanfyri countrymiðstøðina Nashville. Okkurt um tveir og ein hálvan tíma við bili burtur frá Nashville.

Tað er Mike Headrick, ið skal standa fyri upptøkuni. Hann er kendur upptøkumaður og sonevndur promotor. Ragnar hoyrdi um hann sum óføran tøkning og countryfjeppara. Ragnar skrivaði tí Mike eitt bræv, har hann legði fløgu sína við. Síðani hava teir báðir samskift við telduposti.

Og tann 5. oktober fara Ragnar og Alis úr Vík og seta kós yvir hav og til Nashville, har ætlanin er at fáa 14 country løg klár til eina nýggja útgávu við Ragnari í Vík. Lesið meira um hetta seinni í vikuni.



# Sita nýggjan handil í SMS



*Mango fer at serliga at selja gávulutir, sum eru gjørdir í India, men annað veðrur eisini at fáa*

**Í dag letur Sita Rajani upp nýggjan handil í SMS. Handilin skal serliga selja indiskar gávulutir**

Mikumorguin kl. 9.00 letur nýggjur gávuhandilin upp í SMS. Tað er Sita Rajani, sum eigur og rekur nýggjan og snotiliga handilin, sum hevur fingið navnið Mango.

Mangi er ein vælsmakkandi eksotisk frukt, sum veksur í India, og tað er ikki av tilvild, at hetta navnið verður brúkt til handilin. Nøgvir av teimum gávulutunum, sum Sita fer at selja, eru indiskir og gjørdir úr mangotræi.

Í nýggja handlinum fer Sita at selja vørur, sum hon sjálv flytir inn úr India. Nevndast kann millum annað dúkar, seingjarteppi, møblar og silvur.

– Eg havi verið tvær ferðir og keypt vørur í India í ár, og eg havi sostatt nógv áhugavert og forkunnugt. Umframt hetta verða gávulutir ig vørur, sum eru keypt í Europa, eisini at fáa frá mær, sigur Sita.

Hetta er fyrstu ferð, at Sita, sum er útbúgvin sum sjúkrasystur, roynir seg sum handilsánara. Kortini hevur hon royndir við sølu, og í fjør var hon á Torginum í SMS við gávulutum.

Eisini hevur hon verið við á onkrum sølustevnum. Millum annað í Klaksvikar, har hon fekk fyrstu virðisløn fyri vakrasta básin á stevnuni.

Nýggi handilin heldur til á svalanum norðureftir, har Klivin eisini er.



*Sita Rajani letur nú handil upp í SMS*

